## USA í Mannarættindaráðnum

Fyri fyrstu ferð er USA vorðið limur í Mannarættindaráðnum hjá ST. Undanfarna stjórnin hjá George W. Bush, forseta boykottaði nevndina, men Barrack Obama hevur ikki somu støðu. USA var eitt av teimum 18 londunum, sum søktu um limaskap, tá ráðið tók nýggjar limir inn í gjár, og nú eru 47 lond í Mannarættindaráðnum. Millum hini londini, sum gjørdust limir í gjár, er Noreg, sum er tað einasta av Norðurlondunum, sum er í ráðnum. Danmark royndi seg í 2007, men orsakað av stríðnum um Muhammedtekningarnar fekk Danmark ikki nóg nógvar atkvøður til at sleppa uppí.



# Jacob Vestergaard skuldsettur fyri svik

**Tórbjørn Jacobsen sigur, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum vildi hava Løgtingið at broyta lógina um vinnuligan fiskiskap fyri at hjálpa einum ávísum reiðara og nú vil hann hava málið kannað út í æsir**

ÁKÆRA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jacob Vestergaard verður nú skuldsettur fyri at vera korruptur og tað er ein skuldseting, sum Tórbjørn Jacobsen nú vil hava landsstýrismálanevndina at kanna*

Jacob Vestergaard er korruptur!

Tað er heldur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldið.

Í morgun samtykti Løgtingið nakrar broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap, men Tórbjørn Jacobsen heldur, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum er korruptur, tá ið hann leggur eitt uppskot sum hetta fyri Løgtingið.

Og nú vil hann hava landsstýrismálanevndina at taka málið upp og at kanna embætismannaførsluna hjá Jacobi Vestergaard í hesum máli.

Tað, sum Tórbjørn Jacobsen serliga hongir seg í, at, at nú hevur meirilutin í Løgtinginum samtykt at taka skottið upp á 110 tons burtur í skipabólki 4-T, sum eru trolbátar.

Higartil hevur tað verið ólógligt at flyta fiskiloyvi ímillum skip, sum eru størri enn 110 tons og minni enn í bólki 4-T.

Men nú er henda avmarking tikin burtur, so at tað nú verður frítt at flyta fiskiloyvi tvørtur um markið upp á 110 tons í bólki 4-T.

### Ikki reint mjøl í posanum

Men Tórbjørn Jacobsen og fleiri onnur í Tjóðveldinum halda, at Jacob Vestergaard hevur ikki reint mjøl í posanum, tá ið hann vildi hava hesa avmarking burtur.

Hann sigur at orsøkin til, at hendan broyting nú er gjørd, er tann, at onkur reiðari hevur handlað við skipum sum ganga tvørtur um 110 tons markið.

Men higartil hevur tað ikki borið til at flyta fiskiloyvini ímillum, tí tað hevur verið ólógligt.

Loyvini kundu altso ikki leggjast saman, hóast handilin varð gjørdur.

Men Tórbjørn Jacobsen heldur, at tað er nógv, sum bendir á, at reiðarin hevur væntað, at fiskimálaráðið fór at broyta lógina fyri at kunna flyta fiskiloyvið ímillum og tí er Jacob Vestergaard komin í tingið við hesum broytingaruppskoti.

Tórbjørn Jacobsen heldur, at lógarsmíð eigur at vera alment og eigur sostatt ikki at snúgva seg um einstøk seráhugamál.

Hann ávaraði tí staðiliga ímóti at lóggeva beinleiðis eftir einum handli, sum longu er gjørdur.

Men Tórbjørn Jacobsen var ikki einsamallur, tí eisini floksfelagin, Bjørt Samuelsen, tekur undir við honum.

- Fatanin kann lættliga gerast hon, at landsstýrismaðurin er sendiboð fyri ávísar borgarar, sum vilja benda lógirnar til egnan fyrimun, sigur hon.

### Klokkuklárt

Tórbjørn Jacobsen staðfesti tí, at hann vildi hava landsstýrismálanevndina at kanna embætisførsluna hjá Jacobi Vestergaard í hesum máli.

- Hetta er eitt púra klokkuklárt mál, staðfestir hann og tá ið landsstýrismaðurin tvíheldur um nakað annað, sigur hann beinleiðis ósatt av tingsins røðarapalli.

Hin møguleikin er, at hann hevur stórar trupulleikar av sínari umsiting, tí so hevur hon ikki greitt landsstýrismanninum frá, hvat málið snýr seg um, legði hann afturat.

Hann segði, at hann kendi hetta málið frammanundan, tí tá ið hann sjálvur var landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fekk hann fyrispurning um at broyta lógina fyri at blástempla hendan sama handilin.

Og tað er hetta, sum nú er í ferð við at henda, sigur hann.

### Bíða eftir brævi

Jaspur Vang, sum er formaður í Landsstýrismálanevndini, sigur at hann hevur skilt, at Tórbjørn Jacobsen skuldi skriva nevndini eina formliga klagu, har hann grundgevur fyri sínum sjónarmiði.

Tá ið skrivið er komið frá løgtingsmanninum, fer nevndin at taka støðu til um hon fer at taka málið upp ella ikki, sigur hann.

## Taka undir við Jacob Vestergaard

Felagið Trolbátar, sum umboðar skip í bólkinum 4-T, mælir til, at 110 tons-markið verður avtikið.

Tað hevur felagið skrivað til Løgtingið í sambandi við málið, sum er umrøtt í hinum báðum greinunum her á síðuni.

Felagið sigur, at sum støðan hevur verið, hevur bólkurin ikki havt møguleikan at tillaga seg undir galdandi treytir.

Tað kemst av, at nakrir bátar eru undir 110 tons og nakrir er yvir 110 tons og higartil hevur ikki borið til at flyta ella keypa dagar tvørtur um mark og tað heldur felagið Trolbátar er ein grundleggjandi forðing.

Felagið er av teirri áskoðan at verður 110 tons markið tikið av, verður bólkur 4-T javnsettur við aðrar bólkar, tá ið tosað verður um samanlegging innanhýsis í einum bólki og at hetta fer at geva bólkinum betri umstøður at laga seg til broyttar fortreytir.

**-áki-**

# Onki høpi í skuldsetingunum

**Vit hava ikki broytt lógina fyri at hjálpa einum ávísum reiðara, men fyri at geva flotanum betri møguleikan at laga seg til veruliga støðuna**

SVIK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er onki høpi í skuldsetingunum um, at eg skal hava broytt lógina um vinnuligan fiskiskap fyri at hjálpa einum ávísum reiðara.

- Hendan skuldsetingin er íspunnin, staðfestir Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í sambandi við ákæruna, sum Tórbjørn Jacobsen og onnur tingfólk hjá Tjóðveldinum, føra fram í greinini omanfyri.

Hann sigur, at broytingin í lógini um vinnuligan fiskiskap um at taka skottið burtur ímillum skip, sum eru størri enn 110 tons og tey, sum eru minni í bólki 4-T

- Hetta hevur onki við nakran ávísan handil at gera. Hetta er eina og aleina fyri at gera ta lættari hjá øllum 4-T skipabólkinum at laga seg til.

- Veruleikin er, at tað eru ov nógv skip til ov fáar dagar í bólkinum og taka vit markið burtur, verður tað lættari hjábólkinum at laga seg til broyttu umstøðurnar, sigur landsstýrismaðurin.

Hann ásannar samstundis, at handlar eru farnir fram, so tað hevur Tórbjørn Jacobsen rætt í.

- Men uppskotið hevur onki við hesar handlar at gera, men er bara fyri at geva bólkinum møguleikan at laga seg til broyttu fortreytirnar og tað haldi eg er skilagott, sigur Landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at markið upp á 110 varð sett í lógina fyri at forða fyri, at útróðrarbátar blivu gjørdir til stórar línubátar og tað var ongantíð ætlanin at forða fyri, at trolbátar blivu lagdir saman tvørtur um markið.